# Tiltak fyri alla familjuna í Grasagarði fríggjadagin



Í samband við mentunarnáttina 6. juni, fer Barnatannrøktin í Tórshavnar Kommunu, at skipa fyri tiltaki í Grasagarði frá kl. 17.00 til 21.00. 20 Karius´ar & Baktus´ar fara at skipa fyri ymiskum, sum børnini kunna luttaka í. Foreldrini fáa góð ráð og verða mint á, at tað eru tey, sum eiga ábyrdina av tonnunum hjá barninum. Borð við øðrvísi barnaføðingardegi verður uppstillað í garðinum. Til ber at smakka allar teir góðu mjólkaúrdráttirnar frá MBM, sum tey á tannlæknastovuni gera til vælsmakkandi "smooti´es". Børnini kunnu royna bóltkast. Fær barnið allar tenninar um koll, er okkurt smáting at fáa. Eisini verður fiskibrunnur til tey smæstu. Ynskir onkur at gevast við suttuni, kunnu tær hangast á eitt træ í Grasagarði.

- Øll eru hjartaliga vælkomin, siga tey fra Barnatannrøktini í Tórshavnar Kommunu.




















